# Kokkur

Við hesum verður søkt eftir kokki til Strandfaraskip Landsins at seta í fast starv frá 10. septembur 2007.

Viðkomandi skal byrja umborð á Smyril, men kann til eina og hvørja tíð verða fluttur umborð á onnur skip hjá Strandfaraskipum Landsins.
Arbeiðs- og vaktarskipanin er fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein er settur umborð á.

**Starvið fevnir um**
Høvuðsuppgávan hjá kokkinum er at matgera til manningina og matsøluna umborð.

Kokkurin hevur ábyrgd av:
- At reinføri er eftir galdandi ásetingum
- Tryggja at trygdin umborð er í samsvari við altjóða krøv
- Tryggja gott samstarv við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar

**Førleikakrøv**
- Vinnubræv sum skipskokkur
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Heilsuprógv
- Sløkkiskeið
- Fyrsta hjálp
- Góð samstarvsevni
- Góðan røkjuskap

**Vit bjóða**
Eitt sjálvstøðugt og spennandi starv
- Fakligar avbjóðingar
- Eitt starv sum tú sleppur at skipa og menna
- Gott samanhald

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 16.juli 2007.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heina á Borg, deildarleiðara tlf. 34 30 00 lokal 3061, ella e-post: hab@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í fimm deildir: Samferðslu-, Sjó-, Fíggjar-, Starvsfólka-, Farma- og cateringdeild.

---

Keypssamtøkan í Miðbýnum



# Brúkarakvøld um Vistmeti

## Vitan um ráværuna gevur borðgleði

Hóskvøldið 12. juli kl. 20 fer Katrine Terkelsen at halda fyrilestur um vistmeti. Katrine er útbúgvin á Suhrs Seminarium í Keypmannahavn sum bachelor í føðigóðsku og heilsu.

Fyrilesturin, sum verður í Keypssamtøkuni í Dr. Jakobsensgøtu, byrjar klokkan 20 við, at luttakararnir fáa vistfrøðiligt kaffi.
Síðani sigur Katrine frá í uml ein tíma, til hvøi verður at smakka óteljandi sløg av vistmeti.

Høvi verður eisini at keypa vistfrøðiligar vørur heim við sær.

Atgongumerki (avmarkað tal) fáast fyri kr 20,- í breyðsøluni í FK Dr. Jakobsensgøtu.

***Føroya Keypssamtøka***
***Dr. Jakobsengøtu***

fk

---

**Opið er soleiðis:**
fríggjadag og leygardag
frá kl. 13.00 – 17.30
(ella eftir avtalu)
Mikkjalstrøð 11
tlf 31 37 57 / 27 22 12

**Handilin við silkiklæðum úr eysturlondum, Kina, Tailandi, og Indien.**

**Komið og hyggið – nógv nýtt og spennandi!**



**1001 nátt**
*– a touch of the Orient*

---

# Summarfrí

## 16. juli – 3. august

Vegna summarfrí er avgreiðslan stongd frá mánadegnum 16. juli til fríggjadagin 3. august, báðir dagar íroknaðir. Opið verður aftur sum vanligt mánadagin 6. august.

Telefonavgreiðslan er tó opin mánadag til fríggjadag kl. 10:00 - 12:00. Eisini er møguligt at seta seg í samband við ALS um telefax ella teldupost.

Útgjøldini av arbeiðsloysisstuðli fyri skeið 14 og 15 verða avgreidd sum vanligt.

ALS
Arbeiðsloysisskipanin
Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo

sansir.fo